Ár 2009, hin 20. oktober

76.
Verkætlanarbólkur til Spinnaríið.

Vísandi til hjálagda tilfar, og at bygningurin varð latin kommununi við teirri ætlan, at hann skuldi nýtast og verða tøkur til mentanarlig endamál í seinasta lagi um 4 ár, verður mælt til, at ein verkætlanarbólkur verður settur, sí uppskot í 6 pkt. Og skriv frá mentanardeildarleiðaranum, sum mælir til, at formaðurin í Mentanarnevndini, borgarstjórin og mentanardeildarleiðarin seta verkætlanarbólkin, sum verður ein trí-mannabólkur.

Mentanarnevndin tekur undir við tilmæli 08.10.09, og at verkætlanarbólkurin verður ein 5-mannabólkur, har formaðurin í MeN og Óluva Klettskarð eru limir í bólkinum. Hesi velja teir limir, sum skulu verða í bólkinum

Fíggjarnevndin tekur undir við MeN 12.10.09 og minnir samstundis á, at neyðug kunning eigur at verða javnan millum arbeiðsbólkin og mentanarnevndina/borgarstjóran.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

77.
09/00747 Skitsuuppskot til ellis- og røktarheim – flytan millum kontur.

Víst verður til skriv frá forkvinnuni í Sosialu nevnd, dagf. 02.10.09.

Sosiala nevnd samtykti at flyta kr. 20.000 frá kontu "ymiskur stuðul" til Byggi- og býarskipanarnevndina. Víst verður til skriv frá Elsebeth G. Hansen, forkvinnu í nevndini, dagf. 02.10.09.

Fíggjarnevndin tekur undir við SoN 07.10.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

78.
09/00752 Fíggjarstøðan á tekniska økinum 2009.

Til nevndarfundirnar í sept. varð upplýst, at fíggjarliga støðan á tekniska økinum fyrra hálvár 2009 vísti javnvág, og at tað mesta av íløgujáttanini var brúkt. Ein gjøgnumgongd av fíggjarviðurskiftunum og tørvinum í september vísir, at ov lítið av peningi er tøkur til bráðfeingis arbeiðir, sum koma undan kavi dagliga, men tann samlaði raksturin av tekniska økinum sær út til at halda, men hetta bert um onkrar reguleringar verða gjørdar og um ikki stórar óvæntaðar útreiðslur koma. Sí frágreiðing og tilmæli í 4 pkt. frá býarverkfrøðinginum.

Tekniska nevnd viðgjørdi tilmælið frá Hera Hammer, býarverkfrøðingi, dagf. 02.10.09. Nevndin tekur undir við tilmælinum pkt. 1,2,3 og 4.

Fíggjarnevndin tekur undir við TN 06.10.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

79.

2006-11-008 Lendi til møguligt dansistað.

Vísandi til fíggjarnevndarsamtykt frá 16. September 2009, er hjálagt uppskot um plasering av dansistaði á økinum norðanfyri fótbóltsskýlið.
Vísandi til uppskot um staðseting av dansistaði, tekur Tekniska nevnd undir við hesum, og vísir á, at hetta er eitt øki, íð hevur langa traditión fyri at hava dans. Atlantis og KÍ-høllin og ikki minst tann gamla dansistovan.

Mentanarnevndin tekur undir við TN 06.10.09

Fíggjarnevndin tekur undir við MeN 12.10.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

80.
09/00027 Kommunal umskipanarnevnd.

Víst verður til álit frá kommununevndini, sum júst er lagt alment fram.
Fíggjarnevndin umrøddi álitið frá kommununevndini, sum verður nærri viðgjørt seinni.
Nevndin tekur staðiliga undir við, at ein javningarskipan verður sett í verk, og at ein útlegging av uppgávum/málsøkjum verður tryggjað, áðrenn samaleggingar av kommununum verða framdar. Nevndin mælir staðiliga frá blokkstuðulsskipanum millum land og kommunur. Nevndin metir, at tað er umráðandi, at verandi útoyggjar ikki missa síni rættindi.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

81.
09/00753 Marknaumskipan matr. 867a, 739e og 794a.

Talan er um, at ein avlopssnøkil millum Oman Eið og matr. 94g verður marknaumskipaður, soleiðis at hann framyvir verður partur av matr. 794g. T.U. mælir til at játta, treytað av, at umsøkjarin sjálvur ber kostnaðin av matrikulering, og rinda kommununi kr. 110,-/m2 fyri kommunala partin.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U., dagf. 02.10.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

82.
09/00737 Umsókn um marknaumskipan matr. 252a til 50a í Klaksvík.

Víst verður til umsókn frá eigarunum um, at parturin hjá matr. 252a í Akursmørk verður fluttur til matr. Nr. 50a. – Umskip-anin ber í sær, at matr. Nr. 252a ikki longur verður parturin av Akursmørk samstundis sum parturin hjá matr. 50a í Akursmørk fer úr 1gl. til 2gl. T.U. hevur ongar viðmerkingar til umskip-anina.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U., dagf. 02.10.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

83.

09/00164 Endurskoðan og framhald av byggi- og býarskipanararbeiði kommununnar.

Síðani seinastu býráðssamtykt frá 24.mars 2009 er nýtt tilfar komið í málið, sum byggi- og býarskipanarbólkurin við áhuga hevur gjøgnumgingið.
Byggi- og býarskipanarbólkurin tekur fyri ein part undir við innkomna uppskoti, og metir tað vælegnað sum útgangsstøði í einari hugskots- ella arkitektakapping. – Bólkurin mælir tí nevndum og býráði til at halda fast við býráðssamtyktina frá 24.mars 2009, har leisturin fyri víðari arbeiðnum er lagdur. – Sí annars skriv frá byggi- og býarskipanarbólkinum, dagf. 1.oktober 2009

Byggi- og býarskipanarnevndin heldur fast við býráðsviðtøkuna frá 24.mars 2009

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli og viðtøku frá BBN dagf. 5.oktober 2009.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

84.
09/00348 Miðbýarætlanin við støði í uppskot hjá A.Black o.ø.

Í skrivi, móttikið 5.maj 2009 skjóta 5 býráðslimir upp, at kanna politiska viljan at arbeiða við endurskoðan av býarskipanini við útgangsstøði í uppskotinum frá Archibald Black og fylgibólki hansara.
Byggi- og býarskipanarbólkurin tekur fyri ein part undir við umrødda uppskoti, og metir tað vælegnað sum útgangsstøði í einari hugskots- ella arkitektakapping

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka fund við A.Black fyri at finna útav, í hvønn mun partarnir kunnu arbeiða saman við málinum.

Tekniska Nevnd tekur undir við BBN dagf. 5.oktober 2009.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

85.
09/00282 Fíggjarætlan 2010 – Býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at seta kr. 500.000 av til býarplansarbeiði.

Heilsunevndin mælir til, at kr. 500.000 verða brúktar til liðugtgerð av spillivatnsætlan í 2010, vísandi til kunngerðina, og kr. 500.000 til akuttar (ætlanir) kloakkarbeiðir. Harafturat ger nevndin býráðnum greitt, at brúkast skulu upp til kr. 25.000.000 innan 2015 tá íð komið skal verða á mál við dagføringini av kommunalu kloakkunum.

Ferðslunevndin mælir til, at kr. 500.000 verða avsettar til ferðslunevndina í 2010

Havna- og Vinnunevndin mælir til hesar broytingar í uppskoti, dagf. 29. apr. 2009:

Marknaðarátøk kr.	+ 150.000
Oljunýtsla kr.	+ 50.000
Ums. Havnir og brúgvar kr.	+ 500.000
Umsiting fendara v.m. kr.	+ 50.000
Stengurnar kr.	+ 200.000
Havnaskrivstovan kr.	+ 30.000
Rakstur /nýggjur bilur kr.	+ 300.000
Menning Kl. Havn kr.	+ 150.000

Ums. El-innstallatiónir kr.	+ 50.000
Ums. Bátabrúgvapláss kr.	+ 50.000
El- og vatnveitingar kr.	+ 100.000
Bylgjubrótari kr.	+ 300.000
Ruddingarátøk kr.	+ 300.000
Asfaltering havnaøki, Kósin v.m, kr.	+ 1.200.000
Samlaðar inntøkur kr.	8.590.000

Sølutorg á havnaøkinum.
Mælt verður til at seta kr. 350.000 av til sølutorg á havnaøkinum og at avtala verður gjørd við møguligum samstarvspart.

Nevndin er samd um at taka fíggjarætlanina hjá Kl. Havn fyri 2010 til viðgerðar tann 1. Juni 2010, við møguligum reguleringum fyri eygað.

Mentanarnevndin vísir til uppskot 18.09.09 og til tilmælið 08.10.09 saman við útgreinan av kontubólki nr. 450
Annars verður mælt til, at peningur verður settur av til:

Viðlíkahald spælipláss kr.	100.000
Uppihaldshjálp skúlanæmingar í Kalsoy	- 50.000
Bókasavnið telduútbúnað lidnan kr.	100.000
Verkætlanarb. Spinnaríið kr.	200.000
Atlantis lániavdrøg kr.	500.000
Skúlin á Ziskatrød íløgur kr.	360.000
Bygdarhús í Árnafirði grundøki kr.	120.000

Framhald

Sosiala nevnd vísir til tilmælið fra Jancy B. Klein, sosialdeildarleiðara, dagf. 05.10.09. Nevndin hevur samtykt at taka undir við tilmælinum. Nevndin mælir til, at ein játtan á kr. 300.000 verður sett av á fíggjarætlanini til "Ung í arbeiði".

Tekniska nevnd viðgjørdi skriv frá Óla M. Lassen og Hera Hammer til nevndina, dagf. 06.10.09 fyri avsetingar til fíggjarætlan 2010. Nevndin tekur undir við ætlanini, dagf. 18.12.08 við teimum hækkingum, sum eru nevndar í skrivinum, dagf. 06.10.09

Fíggjarnevndin mælir til, at tilmælini frá nevndunum verða viðgjørd á temafundi býráðsins 16.10.09 útfrá fylgjandi fíggjarkarmi:

Skattainntøkur kr.	120,0 Mkr.
Rakstur kr.	86,0 Mkr.
	= 34,0 Mkr
Íløgur: Ósáskúlin	18,0 Mkr
Ziskatrød	0,35 Mkr
Vegir v.m. 1,85 M kr.	20,2 Mkr.
	13,8 Mkr.
Rentur:	10,1 Mkr.
Avdráttir:	3,7 Mkr.
	0,0 Mkr.

Nevndin mælir til, málið um ellisheim verður viðgjørt í samráð við FMR og tikin uppaftur í mun til fíggjarætlanina.

Á fundi fríggjadagin 16.10.09 kl. 14.00:

Tekniska nevnd, Mentanarnevndin, Havnanevndin, Sosiala nevnd, Byggi- og býarskipananevndin og Heilsunevndin mæla til fylgjandi karmar fyri fíggjarætlanina 2010, og at víðari viðgerðir í nevndunum byggir á hendan karmin:

Skattainntøkur kr.	120.000.000
Rakstur kr.	86.000.000
Kr.	34.000.000
Íløgur Kr.	20.200.000
Kr.	13.800.000
Avdráttir	3,7
Rentur 10,1 kr.	13.800.000
Avlop/javnvigar kr.	0

Fíggjarnevndin tekur undir við MeN, TN,BBN, HaN, HeiN og SoN 16.10.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

86.
09/00418 Møgulig útbjóðing av grundøki í miðbýarøkinum.

Vísandi til býráðssamtykt frá 23.06.09, hevur T.U. nú gjørt uppskot til matrikulering av grundøki til útbjóðingar. Staðseting og skap ber í sær, at vegurin millum Barok og Føroya Bjór verður longdur eystureftir, sum so aftur krevur eina avmarkaða meirútfylling í økinum. Sí eisini notat frá býarverkfrøðinginum, dagf. 01.10.09 frá borgara í býnum.

Tekniska nevnd tekur undir við staðsetingini

Fíggjarnevndin tekur undir við TN 06.10.09

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt